# A SKIPI




## Sjókvinnur

Í nógv ár var tað rárasta hending at síggja eitt konufólk umborð á einum skipi. Soleiðis er ikki longur.
Eitt reiðarí, ið nú hevur sæð virðið í teirri kvinnuligu arbeiðsmegini í verksmiðjuni umborð á einum flakatrolara, er tað hjá Sisimiut.
- Messurin hevur ofta verið ein kvinna, men í dag hava vit fýra konufólk á verksmiðjuni. Tað vísir seg, at tær eru óførar til arbeiðis, serliga í pakkingini, vísir Arnfinnur á.

## 27. MAI

***Skipanin umborð er soleiðis, at teir altíð vita nær teir koma aftur til lands og nær teir skulu mynstra umborð. - Eg kom umborð í gjár og verði aftur í landi 27. mai. Og so skal eg avstað aftur beint áðrenn ólavsøku, 22. juli, vísir Arnfinnur Jacobsen á***